Veðrið

Fimmdagaforsøgnin frá DMI

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Lot til andøvsgul av suðri og landsynningi. Skýggjað og támut veður og møguliga okkurt regnæli. Um kvøldið lítið lot av ymsum ættum og tað klárar í. Hitin millum 7 og 11 stig.



Veðrið hósdagin og fríggjadagin:
Lot til andøvsgul av landsynningi, ið sum frálíður hækkar upp í eystan. Nakað av sól men summastaðni támut veður. Hitin millum 8 og 11 stig, men har ættin er góð kemur hitin upp í eini 15 stig.



Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Gul til stívt andøvsgul av eystri og landnyrðingi og skýggjað. Eitt skifti strúkur í vindi av landnyrðingi við nakað av regni. Hitin umleið 10 stig.

Hesir bátar vórðu mánamorgunin settir á dekkið á Norrønu, sum fór til Noregs. Menn, konur og børn fara at sigla fyri innan sker í Noreg einar tvær vikur.
Mynd: D. Højgaard

Familjuferð til Noregs

BÁTAFERÐ. Tíggju bátar við 32 føroyingum eru farnir til Noregs at sigla

HØGNI MOHR

Mánamorgun fór stórt ferðalag til Noregs við Norrønu. Tað eru limir í Bátafelagnum í Havn, sum fara at sigla innanskers í norskum sjógvi einar tvær vikur. Siglt verður á leiðini við Bjørgvin. Summir bátar fara norður móti Floroy, meðan aðrir fara fram við norsku strondini, suðureftir.

Úr bátafelagnum í Havn frættist, at túrurin er ein sonevndur familjutúrur. Sostatt eru fleiri konur og børn farin við. Eisini eru Bjarnheðin í Hoyvík, myndamaður í Sjónvarpi Føroya, og myndatól hansara við á ferðini. Kanska verða myndir frá ferðini at síggja í SvF einaferð í heyst

Í Bátafelagnum, sum hevur tikið stig til ferðina, eru 390 limir. Formaður er Kartni Olsen.



Eitt hátrýst, 1012 hPa, yvir Norskahavinum fer spakuliga norðureftir. Eitt lágtrýstumráði, 1005 hPa, yvir Atlantshavinum sendir komandi dagarnar lýggja luft inn yvir Føroyar sunnanífrá.



Um vikuskiftið sendir eitt lágtrýstumráði yvir Skandinavisku hálvoynni lýggja luft inn yvir oyggjarnar av eystri.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	13
Nuuk	12
Qaqortoq	15
Ammassalik	8
Saint John's	–
Halifax	–
Reykjavík	12
Seyðisfjørður	5
Tórshavn	6
Lerwick	9
Aberdeen	10
London	18
Tromsø	11
Bergen	11
Oslo	–
Stokkhólm	16
Keypmannahavn	13
Helsinki	17
Moskva	27
Berlin	13
Warzawa	16
Kiev	18
Bukarest	18
Paris	18
Madrid	33
Róm	25
Malorca	28
Athen	30
Malta	29
Tunis	28
Beijing	33
New Dehli	35
Bangkok	28
Jakarta	31
Sydney	15
New York	30
Miami	30
Los Angeles	25
Meksikobýur	–
Panama	–
La Paz	11
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	16



Hitalagið mált frá 25./06. kl 06⁰⁰–26./06. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,4°C
Minsti hiti máldur í juni: **0,0°** Mesti hiti máldur í juni: **20,0°**



Avfallið: 0,0 mm – **mált frá 25./06. kl 6⁰⁰–26./06. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í juni: 46,9 mm

Vestfalskyrrindi

25. juni: Seinna kvarter
1. juli: Tendring/Mánin næstur jørðini

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp	Suðuroyar-/Vágafirði sp	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp	Hestfirði/Sundalagnum fp	Hestfirði/Sundalagnum sp	Vestmannasundi fp	Vestmannasundi sp	Mykinesfirði fp	Mykinesfirði sp	Nólsoyarfirði fp	Nólsoyarfirði sp	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp	Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp	Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði sp	Hvannasundi fp	Hvannasundi sp	Fugloyarfirði fp	Fugloyarfirði sp
28. juni	4.02	16.39	3.02	15.39	3.17	15.54	6.02	18.39	7.02	19.39	2.17	14.54	1.17	13.54	4.17	16.54	5.17	17.54	3.47	16.24	5.02	17.39
29. juni	5.12	17.44	4.12	16.44	4.27	16.59	7.12	19.44	8.12	20.44	3.27	15.59	2.27	14.59	5.27	17.59	6.27	18.59	4.57	17.29	6.12	18.44
30. juni	6.11	18.38	5.11	17.38	5.26	17.53	8.11	20.38	9.11	21.38	4.26	16.53	3.26	15.53	6.26	18.53	7.26	19.53	5.56	18.23	7.11	19.38
1. juli	7.01	19.24	6.01	18.24	6.16	18.39	9.01	21.24	10.01	22.24	5.16	17.39	4.16	16.39	7.16	19.39	8.16	20.39	6.46	19.09	8.01	20.24

Kelda: Skipalistin 2000

Skeið í samráðing

Nú kunnu fólk í fyrisitingini fara á skeið í, hvussu einfaldar samráðingar millum tveir partar fara fram

EYÐUN KLAKSTEIN

Løgmansskrivstovan skipar á hvørjum ári fyri skeiðum, sum millum annað fólk í umsitingini kunnu fara á.

Í ár er fyrsta skeiðið í samráðingarteknikki, og hetta skeið tykist vera sera apropos.

Á skeiðnum kunnu fólk millum annað blíva eitt sindur klókari upp á einfaldar samráðingar millum tveir partar.

Eisini verður undirvíst í at samráðast vegna eitt bakland og við støði í eini heimild, og annar táttur í skeiðnum er samráðingar millum fleiri enn tveir partar...

Tað vera danirnir Nikolaj Lunøe, cand. psych., og Peter Vesterheden, koncernpersonaleschef hjá DSB, sum eru skeiðleiðarar.

Og teir báðir fara at greiða luttakarunum frá, hvussu samráðingarfólk kunnu fremja eitt uppbyggjandi huglag, um smøl og breið mandat og um fimm ótilvitaðar atburðir hjá samráðingarfólki, sum kenna seg kroyst.

Skeiðið verður á Hotel Hafnia 7. september, og fólk við ávísum samráðingarroyndum kunnu luttaka.

Umframt hetta skeiðið verða eisini onnur skeið í heyst. Tey snúgva seg millum annað um starvsfólkapolitikk og lóggávumannagongd.

Sendiharri vitjar

Amerikanski sendiharrin í Keypmannahavn, Richard N. Swett, kemur á vitjan í Føroyum í dag. Vitjanin verður í tveir dagar.

Á vitjanini fer hann at kunna seg um føroysk viðurskifti.

Saman við sendiharranum vitjar eisini kona hansara, Kathrina L. Swett og Søren Hansen, ráðgevi.